# MáF skipar fyri skeiðum

**Meginfelag Áhugaleikara fer nú aftur undir ymisk skeið, og eru fleiri spennandi skeið á skránni hesa komandi árshálvuna**

SKEIÐ
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Meginfelag Áhugaleikara skipar fyri fleiri skeiðum hesa fyrru árshálvuna. Fleiri skeið í raddarvenjingum verða og eitt skeið í pallmynd og ljóssetan. Eitt sjónleikaraskeið verður somuleiðis í døgunum 19. til 21. mars.

Skeiðslærarar verða í sjónleiki Katarina Nolsøe og Kristina Hansen. Í raddarvenjingum Egi Dam og í pallmynd og ljóssetan eru tað senografurin, Snorri Freyr Haldórsson og ljósmaðurin, Árni Baldvinsson, sum verða lærarar.

Teknikkin fyri raddarskeiðunum er Nadine George. Skeiðini verða hildin í høvuðsstaðnum uttan skeiðið vikuskiftið 7.-9. mai, sum verður í Klaksvík.

Kostnaðurin fyri hvørt skeiðið, sum varar íalt 14 tímar hvørja ferð, er 600 krónur, og tá er maturin íroknaður.

Øll sjónleikaráhugað yvir 17 ár kunnu tekna seg til skeiðini við at seta seg í samband við MáF.



*Yngra kvartettin úr Betesda í Klaksvík fer at hava sangløtu í kantinuni á flogvøllinum leygarkvøldið klokkan 21*

# Sangløta á flogvøllinum

**Yngrakvartettin í Betesda fer at hava eina sangløtu í kantinuni á flogvøllinum í morgin, leygardagin**

SANGLØTA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Skipað verður fyri sangløtu í kantinuni á flogvøllinum leygardagin klokkan 21, har vágafólk fáa høvi til at syngja við. Tað er yngra kvartettin úr Betesda í Klaksvík, sum skipar fyri hesari sangløtuni.

Á skránni verður felagssangur, Kvartettsangur, filmbrot, leikur og tala. Aftaná verður bjóðað kaffi við onkrum afturvið.

Yngra kvartettin hevur framført á fleiri sangløtum í seinastuni, og hevur undirtøkan verið góð.

Sangtiltakið á flogvøllinum er líknadni tiltak, sum kvartettin hevur skipað fyri í Mentannarhúsinum í Fuglafirði og Ítróttarhøllini í Klaksvík fyrr í ár.

Heri tiltøk vóru sera væl vitjaði og vóur t.d 800 fólk í Ítróttarhøllini í Klaksvík. 28 februar verður eitt sovorðið tiltak eisini í Ítróttarhøllini í Trongisvági.

Annars er tað at siga um yngru kvartettina úr Betesda í Klaksvík, at hon hevur 3 ár á baki, og kallast yngra kvartettin, tí ein onnur kend kvartett úr Betesda var á markini í sjeyti og áttati árunum, og er aftur aktiv fyri tíðina.

Sangløtan byrjar sum sagt klokkan 21 í annaðkvøld.



*Aðalbjørg Linklett er ein av nýggju leikarunum í sjónleikinum Kaktusblóman*

# Kaktusblóman

**Klaksvíkar Sjónleikarafelag leggur í hesum døgum ta seinastu hondina á fyrireikingarnar til skemtileikin Kaktusblóman, sum hevur frumframførslu leygardagin tann 21. februar**

TÍÐINDASKRIV
*post@sosialurin.fo*

Eftir eitt sera stilt 2003, er Klaksvíkar Sjónleikarafelag á veg á pall við einum skemtileiki ella einari farsu, sum tað eisini verður nevnt.

Kaktusblóman, Fleur de cactus, er skrivaður av Jean Pierre Gredy og Pierre Barrliet.

Leikurin er eisini gjørdur til film í Hollywood. Í Cactus flower, ið er enska heitið, spældi Goldie Hawn saman við millum annað Walter Matthau og Ingrid Bergman.

**Leikurin**

Við einari ørgrynnu av misskiljingum og skjóttkoyrandi dialogum fúkandi um oyruni - og ikki minst vælsitandi og tvíkenda upprunasavninum "Kaktusblóman", er lagt upp til eina sera stuttliga farsu.

Julius er ímyndin upp á tann fullfíggjaða trussutjóvin. Tannlækni, væl fyri fíggjarliga, við villa og nýggjari elskarinnu hvørt vikuskifti. Fyri at sleppa undan pátreingjandi elskarinnum, sigur hann seg hava konu og 3 børn.

Hettar gevur trupulleikar, tá hann hittir tí eggjandi Antoniu, sum hann leggur ást á. Antonia tekur synd í konuni og børnunum, sum Julius sigur seg hava, og vil hitta tey fyri at vissa seg um, at tað ikki er hon, ið leggur seg ímillum hjúnarband teirra.

Fyri at ganga ynskinum hjá Antoniu á møti, fær hann kvinnuliga assistentin hjá sær, sum í duldum er skotin í Juliusi, vinfólk og klientar at hjálpa - og so er lagt upp til ein spennandi, og fyri okkum áskoðarar, sera stuttligan leik.

**Spennandi andlit**

Nú Kaktusblóman, Fleur de cactus, er týddur til føroyskt, av Andreas Justesen, Viðareiði, hava vit fingið nøkur kend andlit við. Hyggja vit eftir hvørjir leikarar eru við, so kunnu vit bert ímynda okkum, hvat er í væntu. Adelborg Linklett, Jan Gardar, Petur Simonsen, Durita Samuelsen, Ann Mari Jóhannesen, Bjarni Z. Dahl, Hans Hjalti Skaale og Aðalbjørg Linklett. Klaksvíkar Sjónleikarafelag er kent fyri sínar farsur og er kaktusblóman enn eitt boð uppá hetta.

Leikstjórnað hevur Egi Dam, og hevur hann enn einaferð megnað at víst síni kynstur sum leikstjóri.

Edward Fuglø er pallstjóri. Tað er altíð spennandi at koma til ein leik, har ið Edward hevur havt ein fingur við í spælinum.

Kaktusblóman hevur frumframførslu leygardagin 21. februar kl. 20 í Atlantis.

Meira fæst at vita um leikin og felagið við at vitja heimasíðuna hjá Klaksvíkar Sjónleikarafelag, sum er www.kls.fo.



*Edward Fuglø hevur staðið fyri pallmyndini til leikin*



# Kollafjord Pelagic stríðist við fyrrverandi starvsfólk



*Kollafjørð Pelagic stríðist fleiri av fyrrverandi starvsfólkunum um løn og frítíðarløn.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Frystivirkið í Kollafirði skyldar fyrrverandi tekniska leiðaranum, Christiani Oluf Simonsen, 230.000 krónur í løn og frítíðarløn. Landsstýrismenninir, Johan Dahl og Bárður Nielsen, noktaðu báðir at rinda uppsøgdu starvsfólkunum løn og frítíðarløn**

STRÍÐSMÁL
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Goymslu- og frystivirkið, Kollafjord Pelagic, er aftur í andglettinum. 8-10 fyrrverandi starvsfólk stríðast við at fáa sína løn og frítíðarløn útgoldna. Starvsfólkini vórðu øll uppsøgd í tíðarskeiðnum 2001-2002, men tey fingu ongantíð partar av lønini og frítíðarlønina útgoldið, sum tey sambært løgtingslóg hava krav upp á.

Fleiri av starvsfólkunum, sum Sosialurin hevur verið í samband við, ynskja ikki at úttala seg alment, tí flestu teirra eru um at finna semju ella hava fingið semju við virkið í Kollafirði.

Flest øll teirra fáa hjálp frá fakfeløgum og sakførara í málinum. Ein teirra, ið ikki vil verða nevndur, sigur, at serliga eftir, at Kollafjord Pelagic fekk nýggja leiðslu, hevur gingið lættari at fáa glið á og nú røkist fyri, at málini verða avgreidd.

Sum skilst er tað serliga lønarparturin sum ósemja er um. Fyrrverandi starvsfólkini á Kollafjord Pelagic og leiðslan á virkinum eru ikki á einum máli um, hvussu nógv løn skal rindast. Stjórin á Kollafjord Pelagic, Sofus Poulsen, váttar, at virkið er í samráðingum við fleiri av fyrrverandi starvsfólkunum

– Tað er rætt, at nøkur mál koyra. Vit hava gjørt semju við nøkur av fyrrverandi starvsfólkunum, men tað er framvegis ósemja við nøkur av teimum, sigur Sofus Poulsen í stuttari viðmerking

**230.000 krónur**

Ein teirra, ið framvegis ikki hevur fingið semju við Kollafjord Pelagic er Christian Oluf Simonsen. Í løtuni hava hann og sakførari hansara eina sak koyrandi við Kollafjord Pelagic, har teir krevja 230.000 frá virkinum í Kollafirði fyri vantandi løn og frítíðarløn

27.september í 2002 fekk Christian Oluf Simonsen boðini um, at hann var uppsagdur á Kollafjord Pelagic. Sum tekniskur leiðari á virkinum hevði hann krav upp á at fáa tríggjar mánaðir við løn. Hesa løn fekk hann kortini aldrin.

Christian Oluf arbeiddi á Kollafjord Pelagic í góð ár og hesa tíðina vann hann sær eisini nógva yvirtíð. Hann hevur kortini ongantíð sæð eitt oyra av yvirtíðini, sum hann hevur krav upp á.

Hann sigur, at Kollafjord Pelagic skyldar honum góðar 200.000 krónur í løn og frítíðarløn, men í samráð við sakførari hansara hava teir valt at leggja 30.000 afturat í rentum og mistum inntøkur síðan uppsøgnina.

Í tíðini eftir, hann varð uppsagdur, hevur tað gingið sera striltið at fáa pengarnar útgoldnar og nú vit skriva februar í 2004, hevur hann framvegis ikki fingið sínar pengar. Í juni mánaði í fjør fekk Christian Oluf Simonsen nakað av frítíðarlønini útgoldið, men framvegis restar nógv í.



*Forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag heldur tað er langt úti, at Johan Dahl og Bárður Nielsen sum eru í landsins leiðslu, vóru við til at snýta starvsfólkini á Kollafjord Pelagic. Hon spyr, hvussu føroyingar kunnu hava álit á slíkum monnum.*
*Mynd: Savnsmynd*

**Landsstýrismenn í miðdeplinum**

Nýggju landsstýrismenninir við ávikavist fiskivinnu- og fíggjarmálum, Johan Dahl og Bárður Nielsen hava báðir havt týðandi størv á Kollafjørð Pelagic seinast tvey árini. Johan Dahl varð settur sum stjóri á virkinum á heysti í 2002 og Bárður Nielsen hevur seinastu árini verið roknskaparleiðari á Kollafjord Pelagic.

Hóast Kollafjord Pelagic hevði skyldu at rinda uppsøgdu starvsfólkunum løn og frítíðarløn, sýttu kortini Bárður Nielsen og Johan Dahl fyri at gjalda. Nýggju landsstýrismenninir vóru løgtingslimir um tað mundi, men kortini valdu teir sum lóggevarar at bróta lógina við at sýta fyri at rinda frítíðarløn og løn til fyrrverandi starvsfólkini.

Fyrrverandi roknskaparleiðarin á Kollafjord Pelagic og nýggi Fíggjarmálaráðharrin, Bárður Nielsen, sigur í stuttari viðmerking, at málið um frítíðarlønina varð avgreitt í fjørsummar.

– Kassin var snøgt sagt tómur og tí var einki at gjalda við. Eg var við til at finna semju um frítíðarlønina í fjørsummar og hvat viðvíkur lønini, kann eg ikki úttala meg um, tí eg eri ikki partur av virkinum longur. Eg havi ikki hoyrt annað til frítíðarlønina síðan, og eg dugi ikki at siga tær, hvat er hent aftaná, sigur Bárður Nielsen.

Johan Dahl var settur sum stjóri á virkinum eftir, at starvsfólkini vórðu søgd úr starvi. Hann var kortini stjóri á virkinum 1.mai í 2003, tá frítíðarlønin til starvsfólkini skuldi útgjaldast.

Tað eru greiðar ásetingar í løgtingslóg um, at starvsfólk altíð hava rætt til frítíðarløn og løn, men kortini sýtti Johan Dahl sum stjóri at útgjalda pengarnar. Vit royndu í morgun at fáa fatur á Johan Dahl til eina viðmerking, men tað eydnaðist ikki, áðrenn blað-ið fór til prentingar.

**Langt úti**

Forkvinnan í Føroya Arbeiðarafelag, Ingeborg Vinther, kennir væl til málið. Fleiri av fyrrverandi starvsfólkunum á Kollafjord Pelagic eru limir í Føroya Arbeiðarafelag og tí hevur málið eisini verið umrøtt í felagnum. Ingeborg Vinther er alt annað enn fegin um, at tveir landsstýrismenn hava verið við til at sýta at gjalda løn og frítíðarløn

– Tað sum er hent á Kollafjord Pelagic er niðurgerandi fyri arbeiðaran. Tað er eisini langt úti, at tveir mans í landsins leiðslu vóru við til at snýta starvsfólkini. Hvussu skulu vit hava álit og trúvirði á slíkum monnum, spyr Ingeborg Vinther.